Leggast kann afturat at hetta skrivaðu vit við til umsóknina um seinasta miðlastuðul.

"
Í 2019 løgdu vit 6430 greinar út, og tað er meira enn 17 greinar um dagin.

Í miðal høvdu vit yvir 24.000 brúkarar um vikuna, sum vitjaðu jn.fo í 2019, tað eru 3000 brúkarar meira um vikuna enn hvat tað var í 2018, tí bestu vikuna vitjaðu 48.900 brúkarar okkum.

Í 2019 vóru 7.686.370 síðuvísingar á jn.fo, sum er 1,2 mió meira enn árið fyri."

Vh
Jóanis Nielsen

-----Original Message-----
From: joanis@jn.fo
Sent: Tuesday, 6 April, 2021 22:01
To: "Sólgerð Magnusdóttir" <solgerdm@logting.fo>
Subject: RE: Mentanarnevndarfundur

Hey Sólgerð

Her kemur eitt skriv frá okkum á jn.fo, tí vit ikki fáa komið til hoyringarnar í morgin tann 7. apríl 2021.

Sum miðlastuðulin er settur saman í løtuni, so fer tað beint í rakstur hjá teimum miðlum ið fáa stuðul. Vit á jn.fo hava roynt at drivið okkara portal so bíliga sum til ber, men tað viðførði at vit ongan miðlastuðul fáa.

Við tí nýggja uppskotinum halda vit, at teir størru miðlarnir koma at fáa uppaftur størri framíhjárættindi. Tað halda vit tí, at við nýggja uppskotinum skal man søkja um stuðul til ymiskar verkætlanir og síðani vísa á hvussu pengurin er brúktur, og vísa á hvat fyri tilfar er framleitt.

Vit meta, at við nýggja uppskotinum verður ov nógv orka løgd í umsiting, og fyri okkum ber tað ikki til at brúka so nógva tíð til umsiting av ikki framleiddum tíðindum.

Netmiðlar skulu hava javnan streym av tíðindum allatíð, og helst hava tíðindini úti áðrenn tey eru hend – tað dragar seg um at verða fyrst við tí aktuella, og tað leggur nýggja uppskotið ikki upp til. Tí halda vit ikki at nýggja uppskotið er gott fyri miðlarnar, og verður tað kappingaravlagandi – um miðlastuðul skal verða framhaldandi so er uppskotið sum í dag verður brúkt betri enn tað sum liggur til hoyringar. Tó vilja vit hava tað úr lógini um 2 ársverk, sum gjørdi at vit ikki fingu stuðul í 2020.

Tá ið tað er sagt, so halda vit ikki tað vera rætt, at tað almenna stuðlar einari vinnu beinleiðis við pengum. Um tað almenna skal stuðla vinnuni so er tað betri við at keypa

eina tænastu (Lýsing) frá vinnuni. Í miðlahøpi er tað so at keypa lýsingar, og fær tað almenna tá okkurt afturfyri pengarnar.

Vit halda best er at miðlastuðulin verður avtikin, fyri at seta allar miðlarnar eins fyri lógini.

Hava tit onkran spurning til okkum kunnu tit altíð spyrja

Vh
Jóanis Nielsen